## VALGREINAR

# Sambandsflokkurin er loysnin

**Joen Petur Petersen**
*valevni Sambandsflokksins í Sandoyarsýslu*



Vit eru farin inn í eitt nytt ár, hvar ið tygum skulu taka støðu til, hvør skal hava landsins leiðslu, og tygum skulu velja 2 umboð fyri Sandoynna inn á Føroya Løgting.

Vit í Sambandsflokkinum bjóða okkum fram til at virka fyri, at tað skal vera liviligt í Sandoynni, og at arbeiðspláss og trivnaður verða her framyvur.

Nú er so nógv lovað av hesum forskelligu kandidatinum, at tað skula nógvir blokkar og fíggjarlógir til, fyri at vit skula røkka á mál við øllum. Ja tað eru so nógvir tunnlar lovaðir, at vit kunnu hoyra hvøllan song, eitt nú sangin "Lítið yvir føroyaland" tá ið hann liggur høgt.

Eitt sum ikki er nøktandi í sandoynni eru læknaviðurskiftin. Tey eru út av lagi vánalig. Vit hava bara eina fyribyls loysn, sum ikki er nóg góð.

Vit mugu og skulu hava 2 læknar í Sandoynni, og Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri, at tað kemur í rættlag. Tílíkt skal bara vera í ordan.

Eitt sum liggur á láni her í Sálavík er grótkastið. Tað treingir til eina hjálpandi hond, av tí at tað er sjunka 1 1/2 til 2 metrar. Verður einkið gjørt kann tað henda, at bátar ikki kunna liggja her um veturin. Um tað skal vera møguligt at hava bátar liggjandi í Skálavík alt árið, skal og má grótkastið gerast.

Vit skulu minnast til, at allir vanligir útróðrarbátar sum eru í Sandoynni, kunnu koma her til umvæligar og til viðlíkald, men verur brim meðan teir liggja her, kan henda stórur skaði. Fyri báteigarar í Sandoynni er tað ein stórur fyrimunur, at teir sleppa frá at fara av oynni, tá bátarnir skulu umvælast. Hetta vil Sambandsflokkurin arbeiða hart fyri at gera naka við. Bátar skulu kunna liggja her alt árið.

Ungdómurin skal trívast í oynni. Her skal gerast ein íttróttarhøll, so at børn og ung kunnu fara til síni ítriv, eitt nú flogbólt, hondbólt, fimleik o.s.fr., hvar vit kundi bjóða okkum fram til kappingar. Høllin skal kunna brúkast av skúlunum og ítróttarfelagnum, og so vil eg meta, at hon verur løgd so nær at fótbóltsvøllinum sum møguligt. er at man kann gera ta so at áskoðarapláss vera gjørd, skiftirúm til spælarar ja alt ein nyggj høll skal hava fyri at líka altjóa treytir og ikki at gloyma eina cafe vi tíðarhóskandi facilitetum at man eitt nú kundi havt hana opna soleiðis at ungdómurin frá skúlanum fekk sína máltíð har og at fólk sum komu í oynna kundi stokka inn á gólvi til sína máltí hetta kundi gott veri til at figgja naka av høllin men eg haldi at landi skuldi spýtt nakrar milliónir í Sambandsflokkurin stuðlar fult og heilt einum ítróttarháskúla.

Tá ið tit fara á val hugsið at tit tá fáa meira við at velja sambandsflokkin ella eitt av valevninum tann 20 januar.

# Familjan í hásæti

**Elin Tausen**
*valevni Miðflokksins í Suðursteymi*
*Formaður í "Ung fyri Miðflokkin"*



Til hetta løgtingsvalið sæst at familjupolitikkur verður settur fremst í fleiri valskráum. Miðflokkurin hevur altíð raðfest familjuna sera høgt í síni stevnuskrá. Tí frøðir tað okkum, at aðrir flokkar eru farnir at taka undir við sjónarmiðum, sum vit hava ført fram, síðani flokkurin var stovnaður. Hetta vísir at tørvur er á einum flokki sum Miðflokkinum, til at vísa hinum flokkunum á gongdar leiðir.

Í valskrá okkara standa hesi punkt undir familjupolitikki, sum vit ynskja at virka fyri komandi valskeið:

- Ansingarstuðul skal fylgja barninum. Avsláttur um man hevur fleiri børn á dagstovni, max. gjald má ásetast.
- Barsilslógin útbyggjast stigvíst, til farloyvi í eitt ár við løn.
- Stuðul til heilsustyrkjandi føði á stovnum. Mjólkarstuðilin hækkast aftur.
- Rentustuðulin endurskoðast, forteytir fyri lántøku ikki broytast.
- Pensiónsfløkjan má greiðast. Fólkapensiónin, samhaldsfasti og privatar pensiónsskipanir.
- Holl vegleiðing og ráðgeving verður veitt teimum, sum gerast hjún.
- Viðurskiftini á leigumarknaðinum verða skipað við lóg. Lóg um alternativir bústaðir.
- Samskipan av landsins familjupolitikki. Trivnaðarkanningar.

Alt hetta kemur at verða við til at bøta munandi um støðuna hjá barnafamiljuni, sum er hornasteinurin undir samfelaganum. Tað eigur at verða rikin ein sera virkin familjupolitikkur tey komandi árini, hetta er ein trygd við Miðflokkinum á tingið.

Vel ein sterkan Miðflokk á ting tann 20. Január, so vit fáa størri ávirkan á gongdina í samfelaganum.

Miðflokkurin - Eitt trygt samfelag - fyri øll!

# Tíðarhóskandi vinnumynstur

**Súsanna Dam**
*valevni Sambandfloksins í Suðurstreymoy*



Okkara vinnumynstur kann bert samanberast við eitt annað av øllum heimsins londum, landið eitur Rwanda. Eingi onnur lond liva bert av einari handilsvøru.

Vit hava vælútbúgvin fólk, vit hava vælskipaði viðurskifti á teimum týdningarmiklu økjunum har Rwanda er frumskógur, infrastrukturur, o.s.v., men viljin hjá politikkarum til at geva einum framfýsnum ígongdsetara ein møguleika manglar heilt og aldeilis. Higartil hevur man kanska enntá roynt at leggja forðingar fyri tey, sum hava ditta sær at hava eina ætlan um okkurt annað enn fiskivinnu. Vildu politikkarar, so kundu teir fyri árum síðani havt syrgt fyri, at ígongdsetarar fingu atgongd til góðar orkukeldur og stuðulsskipanir, av bæði fíggjarligum og praktiskum slagi. Men tað er eins og ein stór ræðsla kemur í politiska systemið, tá nakar mælir til at veita stuðul. Sambandsflokkurin ræðist ikki stuðul, tá umræður stuðul, og ikki lívslangar høkjuveitingar, og flest onnur lond - Rwanda helst undantikið - veita vinnuframastuðul av ymiskum slagi. Har er hvørki skomm ella nakað illgrunavert í at fáa ávísan stuðul.

Eftir valið verður sum skjótast farið undir at laga okkara vinnu til nútíðar umstøður. Við politiskum ábøtum verða vit at fyriskipa soleiðis, at almenna umsitingin ikki á hvørjum ári megnar at avtaka ein heilan árgang av nýútbúnum akademikarum, tí tað er frá teimum væl-útbúnu ungu, at ígongdsetararnir skulu koma. Hin vaksandi almenna umsitingin er størsta forðingin fyri, at Føroyar menna eitt virkið og fjøltáttað vinnulív, tí hon leggur hald á størsta partin av tøku fíggjarligu og mannaorkuni. Við skatti, mvg og øllum avgjøldum rindar hvør skattaborgari eini 80 til 85 oyru av hvørjari vunnari krónu fyri at uppihalda almennu umsitingini. Sambandsflokkurin fer sum skjótast eftir valið at leita upp og ikki minst kunngera hvørjir møguleikar eru til at seta ferð á, so vit fáa flutt okkara framleiðsluvíðurskifti úr miðøldini fram til dagsins veruleika.

# Eldrarøktin ein skandala

**Jón Ellendersen**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Tað fær ikki meg at tiga, at eldraøkið verður nýtt sum valagn av summum, sum í verki hava víst, at teir einki leggja í tey eldru.

Tað sum hevur týdning er, at eldraøkið SKAL vera í fokus.

Meðan tjóðveldisflokkurin hevur umsitið eldraøkið er standardurin á røktar- og ellisheimunum fallin munandi. Í staðin fyri at varðveita tann høga standardin sum var, hava tjóðveldismenn valt at ofra ellis- og røktarheimini og heimarøktina fyri nøkur nýggj sambýli.

Hetta er einki minni enn ein skandala.

Tað ber ikki til, at vit í einum so framkomnum landi, har vit javnan jabba og sjabba um, hvussu stóra virðing vit hava fyri teimum eldru, bera okkum soleiðis at. Hava vit onga virðing fyri teimum eldru og syrgja vit ikki fyri, at tey hava tey allarbestu viðurskiftini, so er betri at bæði alivinnan og rækjuvinnan fer fyri bakka.

Tænastustøðið á ellis- og røktarheimunum SKAL í minsta lagið uppaftur á tað, tað var, tá tað var sum hægst.

Sig mær, hugsa menn yvirhøvur ikki um, at teir um fá ár eru ein teirra eldru, og at tá er ov seint at irða seg um, at teir fóru so illa við sínum egnu eldru.

Eldraøkið er eitt av aðalmálum mínum, og fer altíð at vera tað.

X við D tryggjar eldraröktina.

## VALGREINAR

# Okkara børn og ungu eru okkara framtíð!

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins í Sandoyar valdømi*



Framtíð Føroya fólks er ikki olja – men okkara børn og ungu. Tí er Javnaðarflokkurin sannførdur um, at skúlaverk okkara skal vera fult á hædd við tað hjá okkara grannatjóðum.

Politikkur Javnaðar-floksins hevur verið og er, at øll skulu hava rætt til skúlagongd og útbúgving uttan mun til fíggjarviðurskiftir ella, hvar í Føroyum vit búgva og uttan mun til førleika og evnir annars. Javnaðarflokkurin vil játta skúlanum orku samsvarandi hesum.

Skúlin, sum byggir á kristna grund, skal við arbeiðshættum sínum fyrireika tað uppvaksandi ættarliðið til at liva og virka í einum fólkaræðisligum samfelag. Skúlin skal byggja á føroyska samfelagið, har børnini liva, og tey fyrstu skúlaárini eiga at vera í heimbygdini, um møguligt.

Javnaðarflokkurin metir tað sum landspolitiskt mál, at útbúgvingarstøðið og -tilboðið er eins um alt landið. Tí vil Javnaðarflokkurin, at landskassastuðul til íløgur og rakstur av skúlaverkinum verður latin og lagaður so, at allar kommunur megna at lúka krøvini í skúlaskipanini.

Í Sandoyar øki eru 6 bygdaskúlar og ein miðskúli. Hetta er sera kostnaðarmikið fyri tær 5 fíggjarliga og fólksliga veiku kommunurnar, og tað kom tí sera illa við, at fráfarandi landsstýri vildi skerja landsstuðulin til skúlabarnaflutning og kroysta bygdaleiðir, sum flytur børnini.

Ein ætlan um skúlatiltak í Sandoynni til ein Lista- og Ítróttarskúla við tilhoyrandi skúlaheimi og ítróttarhøll fær Javnaðarfloksins stuðul. Eisini átrokandi nútímansgerð av skúlabygningum er neyðug. Her vera vit at raðfesta íløgurnar til fíggjarorkuna.

Men fráfarna landsstýri hevur onga krónu játtað til hesar ætlanir, so her kann bert blíva frægari við einum nýggjum landsstýri.

Javnaðarflokkurin vil raðfesta skúlamál sera ovarliga fyri at varðveita tað góða samfelagið.

Veljið Javnaðarflokkin!

# Tey sinnisveiku og røktarheimskrevjandi, og teirra avvarðandi, hava krav uppá eitt talurør á Føroya Løgtingi

**Joan Ziskason**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Eg stilli upp til løgtingsvalið 2004 m.a. tí at:

- Eg vil verða talirør hjá teimum gomlu, sum eru sjúk og veik, og teirra avvarðandi, og loysa teirra trupulleikar, so tey fáa eitt virðiligt lív
- Eg vil arbeiða fyri teimum sinnisveiku, sum hava havt heimstað á psykiatriskari deild í alt ov nógv ár, so tey kunnu kenna seg sum verulig menniskju aftur, og merkja ágóðan av okkara sokallaða vælferðarsamfelag, og annars øllum hinum sinnisveiku, sum øll hava okkurt íkast til okkara samfelag
- Eg kann geva hesi menniskjaligu lyftir, tí míni borgarligu størv eru innan røktarheim, og sinnisveik, so eg havi royndirnar frá teimum, og teirra avvarðandi, og kenni tí teirra tørv
- Eg veit, hvussu vit fíggja omanfyristandandi

Mín meining er, at vit ikki kunnu kalla okkum fyri eitt vælferðarsamfelag, fyrrenn tann dag, okkara samfelag kann røkja omanfyrstandandi uppgávur.

# Fullveldiskósin

**Hanus Hansen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum*



Skjótt so fara vit aftur á val.

Stóri spurningurin hesu ferð er Samband og loysing. Í so máta er tað, sum tað altíð hevur verið til Løgtingsval.

Men hesu ferð hevur tað størri týdning enn nakrantíð, hvar krossurin verður settur.

Hetta kann gerast eitt lagnuval.

Ikki síðani 1946 hava vit verið so væl ávegis loysing sum nú.

Sjálvt um hesin spurningurin hevur verið á loftið á hvørjum vali, so er hann oftast druknaður í tí partapolitisku telvinginí aftaná valið.

Loysing er nakað, sum altíð hevur ligið so passaliga langt frammi í tíðini, at tað ikki hevur órógvað tann politiska svøvnin hjá fólki.

Ongantíð skal tann rætta løtan hava verið til at tikið loysing. Altíð hevur okkurt verið í vegin.

Í ringum tíðum hevur tað ikki verið talan um at kunna loysa og í góðum tíðum hevur man verið bangin fyri, at skjótt koma ringar tíðir aftur og hvat so.

Hesi bæði seinastu valskeiðini hava verið øðrvísi. Arbeitt hevur verið meiri miðvíst á sjálvstýrisleiðini við ítøkiligum málum.

Fleiri mál eru yvirtikin og enn fleiri mál eru klár til yvirtøku. Vit hava gjørt okkum leysari av Danmark búskaparliga við at minka um Blokkin.

Hesin blokkstuðulin úr Danmark, sum køvir alt vinnulív her á landi. Altíð verður hann drigin fram, tá tað er trupult at fáa Fíggjarlógina at hanga saman ella tá talan er um gomul og sjúk.

Men hvussu var í kreppuni fyri góðum 10 árum síðani. Landið fór so logandi á heysin við fullum blokki úr Danmark. Og hvør sigur, at danir fara at lata okkum nakran stuðul í framtíðini. Blokkstuðulin kann vera avtikin, áðrenn vit vita av og uttan, at vit hava nakra sum helst ávirkan á tað. Tá hjálpir lítið, at fara hesa mannminkandi biddaragongdirnar til Keypmannahavnar, sum føroyingar hava gjørt í øldir og oftast komnir aftur sum av torvheiðum.

Vandi er fyri, at alt, sum higartil er gjørt á sjálvstýrisleið, at Lisbeth og Marius saman við onkrum øðrum sum halahang koma at ráða fyri borgum aftaná valið.

Føroyar verða bumbaðar minst 50 ár aftur í tíðina um Sambandsflokkurin sleppur framat.

Sambandsflokkurin er tað døkka kapitlið í Føroya søgu. Hann hevur altíð dúvað uppá og gjørt sær dælt av okkara trælamentan. Hann hevur altíð verið klárur at sáa iva um okkara megn.

Ongantíð skulu vit kunna klára nakað sjálvir. Altíð skulu vit hava danir sum bakk, um tað nú skuldi gingið galið.Hetta hevur hann trúttað niður í okkum í meiri enn eina øld.

Sambandsflokkurin hevur verið ímóti flest øllum tiltøkum, sum hava vent frameftir. Hann var t.d. ímóti nøkrum týdningarmiklum sum tí føroyska málinum í skúla og kirkju, tá hesin spurningur var aktuellur.

Tibetur so hava føroyingar ikki altíð lurtað so væl eftir hesum jabbinum um ómegd. Og serliga tey seinastu árini eru vit veruliga farnir at trúgva upp á okkum sjálvar. Trælamentaliteturin er við at verða avloystur av einum vinnaramentaliteti. Og hetta sæst aftur serliga í okkara ungdómi, sum nú í størri tali enn áður torir at fara út í fremmand lond at arbeiða ella vinna sær kunnleika. Men enn er langt á mál.

Fyri meg er Sjálvstýri ella Tjóðveldi fyrst og fremst ein spurningur um at trúgva upp á sína egnu makt og megi. Og tað er her, ið Sambandsflokkurin altíð hevur havt eina niðurbrótandi ávirkan á okkum føroyingar.

Og nú sær tíverri út til, at flokkurin aftur er farin at gera um seg. Og tað er sama søga umaftur. Aftaná eina glansperiodu eru teir nú bangnir fyri ringum tíðum.

Men hesu ferð eru vit betur fyrireikaðir til tær ringu tíðirnar enn vit nakrantíð hava verið áður.

Tað er tí alneyðugt at velja ein flokk, sum veruliga vil Fullveldi og, sum undir ongum umstøðum, vil ganga uppá kompromis um fullveldiskósina.

Tað er bert ein flokkur sum uppfyllir hesi krøv. Tað er Tjóðveldisflokkurin.

# Fólkaflokkurin í sambandsleypin

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Nógv bendir á, at Fólkaflokkurin longu undan valinum 20. januar hevur gjørt av, at hann vil í samgongu við Sambandsflokkin.

Í útvarpinum mánakvøldið segði Óli Breckmann, at um Fólkaflokkurin fer í samgongu við Sambandsflokkin, fer flokkurin sjálvandi at slaka í sjálvstýrismálinum.

Óli Breckmann brúkti í sendingini stóran part av síni tíð til at finnast at Tjóðveldisflokkinum. Næstan í øðrum hvørjum setningi hevði hann Tjóðveldisflokkin á oyri og segði lítið um, hvat Fólkaflokkurin ætlar komandi valskeið.

Eisini tá valskráin hjá Fólkaflokkinum í farnu viku varð løgd fram, fríggjaði flokkurin ófert til Sambandsflokkin. Anfinn Kallsberg segði millum annað, at nú Sambandsflokkurin hevur ein hemmiligan skattalætta í ermuni, eru munandi betri møguleikar fyri samgongusamstarvi millum Sambandsflokkin og Fólkaflokkin

Fólkaflokkurin tykist at vera sum veðurhanin. Hann snarar, sum vindurin blæsur. Passar tað honum at sleppa sjálvbjargniskósini, ger hann tað.

Tí eiga allar sjálvstýriskreftir at fylkjast um Tjóðveldisflokkin á valinum. Vit standa við okkara orð og halda kósina.

# Á den øvugta verð

**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksin í Suðurstreymoy*



Vindur og regn eru í Føroyum grundarlagið undir alternativari orku, meðan oljan sum er førd líka úr arabaralondunum er grundarlagið undir natúrligari orku.

Vilja tit vera við at broyta hetta, so bróti uppum armar saman við okkum.

X við lista D.